# Útlendsk skip skulu revsast linari

**Útlendsk og serliga russisk skip hava fingið nógv harðari revsing enn norsk skip fyri somu brot á norsku veiðireglurnar, men nú skal hetta broytast**

ÓJØVN REVSING

*Árni Joensen*

Russisk reiðarí og fleiri norskir sakførarar hava leingi funnist at, at útlendsk skip og serliga russiskir trolarar verða revsaðir nógv harðari í Noregi enn norsk skip, hóast skipini bróta somu veiðireglurnar.

Men eftir ein dóm í Senja tingrættinum í hesari vikuni kemur broyting væntandi í. Í hesum málinum varð eitt norskt reiðarí ákært fyri brot á veiðireglurnar. Ákæruvaldið kravdi, at hald skuldi leggjast á virði fyri níggju milliónir krónur, men rætturin dømdi reiðaríið at gjalda 2,2 milliónir krónur.

Statsadvokatarnir í Troms og Finnmørkini hava fyrr víst á, at tá talan er um útlendsk og serliga russisk skip, er sektin altíð nógv størri, enn tá talan er um norsk skip. Tí boðaðu teir frammanundan frá, at í málinum, sum var fyri í hesari vikuni, átti rætturin at vísa, at norsk skip ella reiðaríir fáa líka stóra sekt sum tey útlendsku. Men tað hendi ikki.

Hallvard Østgaard, sakførari, sum er verji hjá einum russiskum trolara, sum kemur fyri rættin í heyst, sigur, at dómurin í Senja tingrættinum prógvar, at tað eru ikki tey norsku skipini, sum fáa ov lítla sekt, men heldur tey útlendsku, sum fáa alt ov stóra sekt. Tí heldur hann, at ákæruvaldið eigur at taka dómin í Senja til eftirtektar.

Norska ákæruvaldið hevur kravt, at russiski trolarin "Izumrud", sum Hallavard Østgaard er verji hjá, skal gjalda fimm milliónir krónur í sekt, men nú krevur verjin, at sektin í minsta lagi verður sett niður í helvt. Hann sigur, at sektaruppskotið hjá ákæruvaldinum er oman fyri virðið á veiðuni, sum trolarin fiskaði ólógliga. Tá talan er um norsk skip, hendir tað sjáldan, at sektaruppskotið er líka stórt sum veiðuvirðið.

# Svensk ítróttarhetja tikin fyri morð

**Ein svii, sum hevur vunnið gull sum evropameistari og heimsmeistari, er tikin og skuldsettur fyri morð**

SVØRÍKI

*Árni Joensen*

Um náttina tann 8. juli kom ein 31 ára gamal maður fram á ein mann, sum var í ferð við at bróta inn í hús hansara í Stockholm. Innbrotstjóvurin gjørdi skjótt av og myrdi tann 31 ára gamla.

Nú hevur løgreglan í Stockholm tikið ein fyrrverandi ítróttarmann, sum hevur vunnið gull sum evropameistari og heimsmeistari í sínari ítróttargrein. Aftan á morðið tann 8. juli rýmdi drápsmaðurin á súkklu, men var so óheppin at detta. Á staðnum fann løgreglan blóð, sum tað eydnaðist at taka DNA-royndir av, og júst hesar royndirnar hava gjørt, at fyrrverandi ítróttarmaðurin nú verður settur í samband við morðið, skrivar blaðið Expressen.

Maðurin varð tikin fyrr í vikuni, og ein blóðroynd vísti seg at samsvara við tað blóðið, sum løgreglan fann stutt frá drápsstaðnum.

Sambært Expressen veit løgreglan, at fyrrverandi ítróttarmaðurin hevði brotið inn í tvey onnur hús, áðrenn hann breyt inn hjá tí 31 ára gamla tann 8. juli.

Í gjár vildi svenska løgreglan ikki upplýsa, hvør fyrrverandi ítróttarmaðurin er.

# Kongressin flytir til New York

**Fyri fyrstu ferð í 212 ár flytir amerikanska konmgressin úr Washington til New York**

USA

*Árni Joensen*

Leiðslan í amerikansku kongressini hevur gjørt av, at kongressin skal minnast ársdagin fyri yvirgangsatsóknunum í New York á ein serligan hátt. Tí er avgjørt, at øll kongressin flytir úr Washington til New York tann 6. september.

Har hevur kongressin ikki verið í 212 ár. Í 1789-90 húsaðist kongressin í New York, sum var fyrsti høvuðsstaðurin í nýggja sambandsríkinum.

Tað var upprunaliga blaðið New York Daily News, sum kom við hugskotinum, at kongressin átti at fara úr Capitol Hill í Washington til New York í sambandi við ársdagin fyri vanlukkuna 11. september í fjør. Hósdagin samtykti umboðsmannatingið uppskotið, og hildið verður fyri vist, at senatið fer at gera tað sama.

– Setan í New York skal vísa, at kongressin stuðlar New York, og at tjóðin stendur sum ein maður í bardaganum ímóti yvirgangi, sigur republikanski kongresslimurin Vito Fosselo, sum sjálvur er valdur í New York.



*Í september verður amerikanska kongressin flutt úr Washington til New York.*

Eftir upprunaligu ætlanini skuldi kongressin hava eina heila setu í New York, men tað verður av ongum.


NORÐOYA SPARIKASSI

## Roknskapur 1. hálvár 2002

### Rakstrarroknskapur 1. hálvár

| | 2002 1.000 DKK | 2001 1.000 DKK |
|---|---|---|
| Rentuinntøkur o.a. | 35.939 | 37.961 |
| Rentuútreiðslur o.a. | 10.451 | 13.366 |
| **Netto rentuinntøkur** | **25.488** | **24.595** |
| Vinningsbýti av partabrøvum o.ø. | 44 | 41 |
| Kostnaðar- og provisiónsinntøkur | 1.194 | 1.049 |
| Útreiðslur til kostnað og provisión | 37 | 38 |
| **Netto rentu- og kostnaðarinntøkur** | **26.689** | **25.647** |
| Virðisjavnan av lánsbrøvum, gjaldoyra o.ø. | 793 | 1.145 |
| Aðrar vanligar inntøkur | 467 | 266 |
| Útreiðslur til starvsfólk, umsiting o.a. | 12.900 | 11.730 |
| Avskrivingar av ítøkiligum ognum | 526 | 500 |
| Aðrar vanligar útreiðslur | 204 | 269 |
| Avskrivingar og burturleggingar uppá skuldarar (netto) | 2.121 | 3.316 |
| **Úrslit av vanligum rakstri áðrenn skatt** | **12.198** | **11.243** |
| Skattur | 2.474 | 2.266 |
| **Hálvársúrslit** | **9.724** | **8.977** |

### Fíggjarstøða hin 30. juni

| | 2002 1.000 DKK | 2001 1.000 DKK |
|---|---|---|
| **Ogn** | | |
| Kassapeningur og innistandandi uttan uppsøgn í tjóðbankum | 23.330 | 4.473 |
| Ogn hjá peningastovnum o.ø. | 39.676 | 73.445 |
| Útlán | 735.465 | 634.393 |
| Lánsbrøv | 239.369 | 275.933 |
| Partabrøv | 5.571 | 921 |
| Ítøkiligar ognir | 10.656 | 11.130 |
| Aðrar ognir | 5.738 | 4.811 |
| **Ogn tilsamans** | **1.059.805** | **1.005.106** |
| **Skuld og eginpeningur** | | |
| Skuld til peningastovnar | 0 | 0 |
| Innlán | 831.518 | 799.778 |
| Onnur skuld | 12.817 | 10.602 |
| Burturleggingar til útreiðslur | 2.832 | 2.790 |
| **Skuld tilsamans** | **847.167** | **813.170** |
| Eginpeningur | 202.914 | 182.959 |
| Hálvársúrslit eftir skatt | 9.724 | 8.977 |
| **Eginpeningur tilsamans** | **212.638** | **191.936** |
| **Skuld og eginpeningur tilsamans** | **1.059.805** | **1.005.106** |
| **Tøl, ið ikki eru tikin við í fíggjarstøðuni** | | |
| Ábyrgdir | 21.648 | 10.532 |

Ósávegur 1 Postboks 149 FO-700 Klaksvík

Tel: 475000 Fax: 476000 Teldupostur: ns@ns.fo www.ns.fo

VASTI 457171




